FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

FKF jour. nr. 09-79

Løgtingið

Løgtingamál nr. xx/2009: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald

§ 1

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 80 frá 25. mai 2009, verður gjørd henda broyting:

Eftir § 3 verður sett nýggj § 3a:

"**§ 3a**. Feløg, stovnar, grunnar, kommunur og aðrir felagsskapir, hvørs endamál ikki eru tengd at fíggjarligum eginánugamálum, kunnu eftir umsókn fáa endurgoldið inngangandi meirvirðisgjald av útreiðslum til at byggja ítróttar- og mentanarverkløg til almannagagnligt virksemi, um avgjaldsskyldugu útreiðslurnar eru omanfyri 1 mió.kr. og eru hildnar eftir 1. januar 2010, og um tær í stk. 2 settu treytir eru loknar.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin í mentamálum ásetir neyvari treytir og reglur um:

1. hvørji feløg stovnar, grunnar og felagsskapir koma undir stk. 1,
2. hvørji verkløg og hvat virksemi kemur undir stk. 1,
3. hvørji byggiteknisk krøv skulu verða lokin, áðrenn ein umsókn kann verða viðgjørd, eitt nú at nøktandi atlit verða tikin til viðuskifti viðvíkjandi bygging, so sum bruna-, heilsu-, atkomu- og orkuviðurskifti, berandi bygningslutir, innleggingar o.a., og at øll neyðug loyvi og góðkenningar fylgja við umsóknini,
4. fíggjarlig krøv til verkætlanina, har tað skal vera sannlíkt, at fígging er til raksturin av verklagnum,
5. hvussu upplýsingarnar í nr. 1-4 skulu verða skjalprógvaðar, tá søkt verður.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin í mentamálum setir eina nevnd av serkønum at geva TAKS tilmæli um allar umsóknir. Nevndarlimirnir skulu hvør í sínum lagi hava eitt munagott innlit í teir ymsu tættirnar innan ítróttar-, mentanar-, frítíðar- og byggivirkvirksemi, soleiðis at nevndin fevnir fakliga breitt. Umboð fyri kommunufeløgini verða knýtt at nevndini. Nevndin skal í viðgerðini av umsóknum tryggja eina hóskandi landafrøðiliga javnvág og eisini taka atlit at heildarætlanum innan mentanar- og ítróttarverkløg m.a. í sambandi við skipan av altjóða tiltøkum í framtíðini. Landsstýrismaðurin í mentamálum ger starvsskipan fyri nevndina og kann áseta neyvari reglur um nevndina.
Stk. 4. Landsstýrismaðurin í mentamálum kann áseta neyvari reglur um kærumøguleika, eftirlit, upplýsingarskyldu, atgongd til kanningar á staðnum, roknskap og grannskoðan og um at endurgoldið meirvirðisgjald skal rindast aftur, um móttakari ikki longur lýkur treytirnar, t.d. um verklagið verður selt ella ikki longur verður nýtt til ætlaða virksemi og til almannagagnligt endamál.

Kvíggjartún 1 • Postsmoga 2039 • 165 Argir
Telefon 35 20 20 • Telefax 35 20 25 • E-mail: fmr@fmr.fo

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Samstundis verður sett úr gildi løgtingslóg nr. 50 frá 24. mai 1974 um studning til bygging av ungdómshúsum.

Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Á løgtingsfíggjarlógini eru í mong ár settar av 660 tkr. til ungdóms- og bygdarhús og einar 3 mió.kr. til ítróttaranlegg. Bara ein lítil partur er goldin út hesi seinastu mongu árini. Tað hevur verið rættiliga torført at umsita játtanirnar, sum eru lutfalsiga smáar, málsviðgerðin hevur verið tung og drúgv, og eingin lógarheimild hevur verið til tilsagnir tvørturum fíggjarár. Hetta hevur verið darvandi fyri umsøkjararnar, og nógvar umsóknir hava hópað seg upp.

Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2010 vórðu hesar báðar játtanir strikaðar. Í staðin varð skotið upp at játta 10 mió.kr. til "Ítróttar- og mentanarverkløg", og eitt uppskot varð evnað til, sum gjøllari skuldi áseta endamál og treytir fyri at fáa stuðul. Í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógaruppskotinum varð uppskotið strikað aftur við hesi viðmerking frá einum meirluta í Fíggjarnevndini:

"Í staðin fyri at geva stuðul til ítróttar- og mentanarverkløg verða broytingar gjørdar í mvg- lógini soleiðis, at ítróttar- og mentanarfelagsskapir fáa mvg endurrindað eins og vinnuligar fyritøkur í sambandi við bygging."

Ætlanin við at broyta lógina um meirvirðisgjald er at stuðla og menna bygging innan mentanar- og ítróttavirksemi.

Hvør kann søkja, er í høvuðsheitum ásett í lógini, tó at neyvari treytir verða ásettar í kunngerð. Hvørji ítróttar- og mentanarverkløg eru fevnd av lógini, verður gjøllari greinað í kunngerð. Í viðmerkingunum sæst, hvørji verkløg talan ætlandi er um.

Mentamálaráðið arbeiðir harumframt í løtuni við at útvega Føroyum limaskap í Lokale- og Anlægsfonden, sum er ein danskur grunnur, ið eisini virkar í Grønlandi. Grunnurin verður fíggjaður við 8% av donsku veddingarpengunum.

Við limaskapi í LOA fer at bera til at søkja um stuðul ella lán til størri íløgur í ítróttaverkløg, mentanarhús, sjónleikarhús, konserthús, verkløg til skótar, biografar, tónleika- og dansiverkløg o.t. at nýta til almannagagnlig endamál. Tey, sum kunnu søkja eru felagsskapir, feløg, stovnar, grunnar og kommunur, sum ynskja at byggja og reka verkløg uttan fíggjarlig egináhugamál. Hetta er bæði galdandi uttandura og innandura verkløg, og fevnir um nýbygging, útbygging, og nýinnrætning av verandi verkløgum.

Landsstýrið heldur, at tað er umráðandi at stimbra møguleikan kring landið at skapa góðar karmar fyri mentanar- og ítróttarvirksemi. Tað hevur stóran týdning fyri at ung fólk trívast, eins og tað hevur stóran týdning at karmar eru, har skapandi og kreativur førleikar verða mentir. Harumframt er hetta lógaruppskot ein týdningarmikil liður í vakstrarætlan landsstýrisins. Stóra talið av umsóknum um beinleiðis stuðul til áhugaverdar byggiverkætlanir vísir, at tað kring landið er stórt áræði millum manna at fara til verka.

Skotið verður upp, at nevnd verður sett, sum hevur breiðan førleika og munagott innlit í teir ymsu tættirnar innan mentanar- og frítíðarvirksemi, umframt byggivirkvirksemi. Nevndin skal lata TAKS tilmæli um umsóknir og annars síggja til, at byggivirksemi á hesum øki verður samskipað og at atlit verða tikin til landafrøðiliga javnvág.

Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

1. Tað er serliga torført at meta um, hvørjar fíggjarligar avleiðingar uppskotið fer at hava. Tað veldst um tal og stødd á verkætlanum, og um hesar kunnu fáa neyðuga fígging til løgur og rakstur.

   Henda skipan kemur í staðin fyri stuðulin á løgtingsfíggjarlógini, har ásettar hava verið 660 tkr. til ungdóms- og bygdarhús og einar 3 mió.kr. til ítróttaanlegg.

2. Tað verða umsitingarligar avleiðingar fyri TAKS, sum kemur at standa fyri at endurrinda meirvirðisgjaldið.

   Sum partur av umsitingini, verður sett nevnd av serkønum at geva TAKS ummæli viðvíkjandi umsóknum um at fáa meirvirðisgjald endurgoldið.

   Hvussu stórar útreiðslurnar til nevndina fara at verða, er ringt at meta um. Tað veldst um, hvussu nógvar umsóknir vera, og hvussu nógvir fundir nevndin fer at hava í sambandi við viðgerðina.

3. Lógaruppskotið fær ikki beinleiðis fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingarnar fyri vinnuna. Tó fer henda skipan at bøta munandi um stuðulsmøguleikarnar og fer harvið at stuðla uppundir nýggjum virksemi og bygging innan mentan-, ítróttar- og frítíðarvirksemi.

4. Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

5. Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

6. Lógaruppskotið fær avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir. Her verður serliga hugsað um ítróttafeløg og aðrir felagsskapir, sum við hesum verða stuðlaðir at fara undir stórar byggiverkætlanir. Henda nýggja skipanin fer at virka rættvísari, tí hon er galdandi fyri øll, sum lúka tær treytir, ið verða ásettar.

7. Lógaruppskotið hevur ikki ávirkan á millumtjóða sáttmálar.

8. Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur t.d. upplýsingarskyldu ella skrásetingarskyldu. Einastu krøv, ið sett vera, eru í mun til byggiverkætlanina.

9. Lógaruppskotið leggur heimildir til eina nevnd, sum kemur at hava týðandi leiklut í mun til, hvørjar verkætlanir fáa endurrindað meirvirðisgjald.

	Fyri landið/-lands myndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar				Nei	

Ummæli
Stundir hava ikki verið at senda uppskotið til hoyringar, áðrenn tað varð lagt fyri tingið. Ein fundur hevur verið við ÍSF, umboð fyri kommunufelagsskapirnar og Landsverk har lógaruppskot varð umrøtt. Lógaruppskotið er síðani sent til ummælis hjá Kommunufelagnum, Kommunusamskipanini, ÍSF, MBF og Landsverk o.ø. Ummælini verða síðani send Mentanarnevnd Løgtingsins.

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Til § 3a

Stk. 1. Í hesum stykki verður ásett, hvør kann fáa meirvirðisgjald endurgoldið. Talan er um feløg, eitt nú ítróttarfeløg og ungdómsfeløg ella stovnar og grunnar innan t.d. mentanarøki. Somuleiðis kunnu kommunur søkja um at fáa endurgoldið meirvirðisgjald, tá tær byggja verkløg til ítrótt og mentan.

Skipanin fevnir ikki um vinnurekandi felagsskapir, stovnar ella líknandi. Skipanin fevnir heldur ikki um trúarsamfeløg ella um bygging av kirkjum ella samkomuhúsum hjá trúarsamfeløgum o.l.

Skotið verður upp, at avgjaldsskyldugu útreiðslurnar skulu verða omanfyri 1 mió.kr. Markið er sett í mun til støddina á teimum byggiverkætlanum, sum søkt er um stuðul til í verandi skipan.

Skipanin kemur í staðin fyri eina stuðulsskipan, sum fór úr gildi í 2009. Tí er ásett, at avgjaldsskyldugu útreiðslurnar í sambandi við byggingina av verklagnum skulu verða hildnar eftir 1. januar 2010.

Landsstýrismaðurin í mentamálum ásetir treytir, sum somuleiðis skulu verða loknar áðrenn umsókn kann verða gingin á møti, sbr. stk. 2.

Stk. 2. Her er ásett heimild hjá landsstýrismanninum at áseta neyvari reglur um teir felagsskapir og tey verkløg, sum nevnd eru í stk. 1.
Ætlandi er tað landsstýrismaðurin í mentamálum, ið verður at áseta hesar reglur, og verður hetta vanliga ásett av løgmanni í sambandi við kunngerðina um málsøkjabýti.

Ásett verður hvørji verkløg verða fevnd av lógini og sostatt eisini hvørji ikki koma undir ásetingina.

Talan kann bæði vera um uttandura og innandura verkløg, við teirri treyt, at talan skal verða um nýbygging, útbygging ella nýinnrætting av verklagi.

Í høvuðsheitum verður talan um ítróttaverkløg, mentanarhús, sjónleikarhús, konserthús, verkløg til skótar, biografar, tónleika- og dansiverkløg o.t. at nýta til almannagagnlig endamál. Lógin fevnir ikki um kirkjur ella samkomuhús hjá trúarsamfeløgum o.l.

Tað, sum landið við hesi lóg ynskir at stuðla, er bygging av verkløgum, tí fella fleiri útreiðslur uttanfyri lógina, eins og ávísar verkætlanir ikki koma undir lógina:

Vanligt viðlíkahald
Innbúgv, útgerð, neyðsynjarlutir, ljós-, ljóð-, hitaútbúnaður
Verkætlanir, sum eru lidnar
Verkløg sum likamligir persónar eiga
Verkætlanir uttan ein fíggjarligan og løgfrøðiligan ábyrgdarpersón
Verkløg, hvørs høvuðsendamál er undirvísing ella gisting
Verkløg til bústaðarendamál o.l.
Verkløg, hvørs høvuðsendamál er ansing, skúli, barnagarð o.l.
Vanlig spælipláss

Kunngerðin fer somuleiðis at innihalda krøv til sjálva byggingina. Her verður serliga hugsað um byggiteknisk og fíggjarlig krøv.

Krøvini til byggingina fara at verða tey almennu krøv, sum sett vera bygging. Væntandi verður løgtingslóg um bygging, sum arbeitt verður við, løgd fyri tingið í komandi tingsetu. Her er serliga talan um nøktandi krøv til brunatrygd, heilsu- og atkomuviðurskifti, orku- og berandi bygningslutir, innleggingar o.a.

Harumframt skal tryggjast, at verkløg til ítrótt lúka møgulig altjóða krøv, sum sett verða til slík verkløg.

Í mun til fíggjarligu krøvini verður ein treyt, at umsøkjari kann prógva, at fígging er til raksturin av verklagnum, tá byggingin er liðug.

Krøv og treytir, sum skulu verða loknar áðrenn ein umsókn verður viðgjørd, skulu skjalprógvast. Tí verður neyvari ásett um, hvussu skjalprógv skal fyriliggja og fylgja við umsóknini.

Stk. 3. Landsstýrismaðurin setir eina nevnd av serkønum at geva TAKS tilmæli viðvíkjandi øllum umsóknum. Ætlanin er, at tilmæli verð "bindandi", soleiðis at viðgerðin av málinum er í nevndini og at ongin málsviðgerð av umsóknum skal fara fram í TAKS, sum hevur mvg-viðurskiftini og sjálva endurrindanina um hendi.

Ætlandi er tað landsstýrismaðurin í mentamálum, ið verður at seta nevndina, og verður hetta vanliga ásett av løgmanni í sambandi við kunngerðina um málsøkjabýti.

Nevndarlimirnir skulu hvør í sínum lagi hava eitt munagott innlit í teir ymsu tættirnar innan mentanar- og frítíðarvirksemi, og harumframt byggivirkvirksemi, soleiðis at nevndin fevnir fakliga breitt. Her verður hugsað um umboð fyri Mentamálaráðið, Landsverk og ÍSF. Somuleiðis verða umboð fyri kommunufeløgini knýtt at nevndini, eisini fyri at tryggja, at samskifti og samstarv verður tvørturum kommunumørk um størri verkløg, soleiðis at íløgurnar í ítróttar- og mentanarverkløg út frá einum heildarsjónarmiði verða so skilagott raðfestar sum gjørligt, brúkarunum at frama.

Í lógini stendur, at: "Nevndin skal í viðgerðini av umsóknum tryggja eina hóskandi landafrøðiliga javnvág, og eisini taka atlit at heildarætlanum innan mentanar- og ítróttaverkløg m.a. í sambandi við skipan av altjóða tiltøkum í framtíðini."

Her verður serliga hugsað um, at nevndin skal tryggja eina ávísa samskipan og planlegging, tá stór verkløg skulu byggjast, har grundarlag í fyrsta umfari ikki er fyri stórt meira enn einum verklagi, t.d. 50-metra svimjihylur, golfvøllur, skjótibreyt, innandura fórbóltsvøllur og onnur verkløg í sambandi við at Føroyar møguliga ætla at bjóða seg fram til t.d. Oyggjaleikir ella altjóða ítróttarkappingar.

Í slíkum førum verður neyðugt hjá nevndini at hava kunnleika til áhugan í økinum og um hvørjar kommunur eru sinnaðar at fara undir so stóra verkætlan. Tí kunnu umstøðurnar hava við sær, at tað ikki júst verður tann, ið fyrst letur umsókn inn, sum fær umsóknina tilmælta av nevndini, men at nevndin velur at taka onnur t.d. landafrøðilig atlit, eisini hóast ein umsókn ikki fyriliggur.

Landsstýrismaðurin ger starvsskipan fyri nevndina, sum kemur at hava tíðandi leiklut í tilrættaleggingini av verkløgum kring landið. Harumframt kann landsstýrismaðurin áseta neyvari reglur um nevndina, t.d. um talið á nevndarlimum og um hvussu og hvør velur umboð í nevndina.

Stk. 4. Her er heimild at áseta neyvari reglur um eftirlit, upplýsingarskyldu, atgongd til kanningar á staðnum, roknskap og grannskoðan og um at peningur skal rindast aftur, um móttakari ikki longur lýkur treytirnar, t.d. um verklagið verður selt ella ikki longur verður nýtt til ætlaða virksemi ella til almannagagnligt endamál. Talan er um ásetingar, ið vanliga verða ásettar, tá talan er um stuðulslóggávu og kunnu verða ásettar umframt tær reglur, ið eru í lógini um meirvirðisgjald.

Ætlandi er tað landsstýrismaðurin í mentamálum, ið verður at áseta hesar reglur, og verður hetta vanliga ásett av løgmanni í sambandi við kunngerðina um málsøkjabýti.

Til § 2

Vanlig áseting um gildiskomu.

Stk. 2 setir úr gildi løgtingslóg um bygging av ungdómshúsum. Henda lóg hevur verið grundarlagið at rinda stuðul eftir. Tí skulu feløgini, sum hava umsóknir liggjandi í Mentamálaráðnum um stuðul til bygging av ungdómshúsi ella ítróttarverklagi, søkja av nýggjum, so skjótt sum nýggju MVG-stuðulsreglurnar verða settar í gildi.

Nakrar av umsóknunum í gomlu stuðulsskipanini eru komnar so mikið langt, at tilfarið, sum longu er fyrireikað og viðgjørt, kann verða nýtt til nýggju umsóknina.

Fíggjarmálaráðið 26. februar 2010

Jóannes Eidesgaard
landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge